búnaðarstovan

# Umsókn um stuðul til verkætlanir og royndir við føroyskari grønmetisframleiðslu 2017.

Í Løgtingsfíggjarlógini fyri 2017 eru játtaðar 400 túsund krónur til at stuðla verkætlanum og royndum við føroyskari grønmetisframleiðslu.
Játtanin er liður í ætlanunum hjá landsstýrinum um ein nýggjan landbúnaðarpolitikk, har eitt av málunum er at økja um framleiðsluna av dygdargóðum føroyskum landbúnaðarvørum, harundir at framleiða grønmeti.
Játtanin verður umsitin av Búnaðarstovuni.

**Reglugerð fyri játtan til at stuðla verkætlanum og royndum við føroyskari grønmetisframleiðslu í 2017:**

a) **Heiti:** Stuðul til verkætlanir og royndir við føroyskari grønmetisframleiðslu.
b) **Heimild:** Játtanin er ein stuðulsjáttan sbrt. samtykt í Løgtingsfíggjarlógini fyri 2017. Játtanin verður umsitin av Búnaðarstovuni.
c) **Endamál**: Endamálið við stuðlinum er at økja um vitan, royndir og kunnleika, sum kunnu viðvirka til at menna føroyskt framleiddar dygdargóðar jarðarbrúksvørur, serliga framleiðsluna av grønmeti.
d) **Hvør kann søkja:** Einstaklingar, feløg og felagsskapir, stovnar, netverk o.tíl.
e) **Hvørjar umsóknir kunnu vera við:** Umsøkjarar kunnu søkja um stuðul til verkætlanir og royndir. Tað er ein fyrimunur, um hesar leggja dent á verklig evni. Harumframt kann søkjast um stuðul at fáa til vega tilfar til upplýsing og undirvísing um grønmetisframleiðslu, og til upplýsandi tiltøk o.tíl. Týdningarmikið fyri allar umsóknirnar er, at tær skulu kunna metast at hava munandi týdning fyri menning av føroyskari grønmetisvelting og grønmetisframleiðslu.
f) **Eginfígging:** Millum annars javnmettar umsóknir hava tær fyrimun, ið kunnu vísa á eginfígging.
g) **Útgjald:** Játtaður stuðul merkir í fyrstu syftu eina tilsøgn. Stuðulin verður útgoldin, tá Búnaðarstovan hevur fingið vissu fyri, at virksemið lýst í umsóknini er framt á fullgóðan hátt. Búnaðarstovan kann í hesum sambandi krevja frágreiðing, roknskap og annað próvtilfar.
h) **Frágreiðing:** Tann, ið fær stuðul tillutaðan, skal geva Búnaðarstovuni frágreiðing um virksemið, her uppi í eisini roknskaparyvirlit. Frágreiðingin skal vera latin Búnaðarstovuni áðrenn 1. februar árið eftir stuðulsveitingina.
i) **Avmarkingar:** Stuðulin er ikki ein framleiðslustuðul (t.v.s., at talan er ikki um ein stuðul fyri mongd av framleiddari vøru).
j) **Hvussu verða umsóknirnar viðgjørdar:** Umsóknirnar verða viðgjørdar á Búnaðarstovuni sbrt. eini ítøkiligari meting í hvørjum einstøkum føri.
k) **Umsóknarblað:** Serstakt umsóknarblað er at finna á www.bst.fo
l) **Freist:** 27. februar 2017.

# Umsókn

Nýtið spjaldrastavir!

| Heitið á umsóknini: |
|---|
| Av tí, at Búnaðarstovan kunnar á heimasíðuni um verkætlanir, ið verða stuðlaðar, eigur heitið at vera á føroyskum og at geva eina stutta og greiða lýsing av, hvat umsóknin snýr seg um. |

Umsøkjari:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| <u>Um einstaklingur søkir:</u><br>Navn:<br>P-tal:<br>Bústaður:<br>Telefon:<br>Teldupostur:<br>Kontonummar í peningastovni:<br><br>ella<br><br><u>Um felag/felagsskapur, stovnur, netverk o.tíl. søkir:</u><br>Navn:<br>Ábyrgdarpersónur:<br>V-tal:<br>Bústaður:<br>Telefon:<br>Teldupostur:<br>Kontonummar í peningastovni:<br><br>Hóast nógvir luttakarar eru í verkætlanini, skal ein ávísur persónur hava ábyrgdina og taka sær av samskiftinum við Búnaðarstovuna. | | | | |
| MVG-skrásettur: Ja | | Nei | | Set X við rætta |
| Aðrir luttakarar í verkætlanini:<br><br>Um aðrir luttakarar eru við í verkætlanini, skulu teir og teirra bústaðir lýsast í hesum teigi. | | | | |

# Umsókn

## Um talan er um verkligar royndir:

Í hvørji markatalsbygd og á hvørjum matr. nr. verður verkætlanin framd:

Um talan er um staðseting á fleiri støðum, skrivið tá øll.

Hvør eigur ella umsitur lendið, har verkætlanin/royndin skal vera:

Um talan er um staðseting hjá fleiri eigarum/umsitarum, skrivið tá allar.

Hvussu stórt er lendið í vídd, har verkætlanin/royndin skal vera:

Um talan er um staðseting á fleiri støðum, skrivið tá víddina á hvørjum luti sær og telji somuleiðis saman.

Eru kort og/ella myndir av lendinum við umsóknini?:

Gott kortgrundarlag, myndatilfar o.tíl. lættir m.a. um viðgerðina av umsóknini. Leggið hesi við sum talmerkt fylgiskjal.

Hvat grønmeti er ætlanin at velta, og hvussu samsvarar hettar við reglugerðina fyri játtanina:

Greiðið frá um, hvørjar vøkstrir, ið ætlanin er at velta, um marknaðarmøguleikar o.tíl. Greiðið somuleiðis frá, hvussu ætlanin samsvarar við endamálið við játtanini.

## Um talan er um ástøðiligar ella bókligar royndir, netverk, tiltøk o.tíl.:

Hvørji evni, spurningar ella t.d. trupulleikar miðar umsóknin eftir at viðgera, loysa ella bøta um:

Greiðið frá tí evni, miðað verður eftir at arbeiða við, og hvussu arbeiðsgongdin er løgd til rættis. Vísið t.d. á spurdómar, trupulleikar e.tíl., ið ætlanin er at viðgera. Greiðið frá, hvør tekur sær av teimum ymsu, ætlaðu uppgávunum, hvussu tíðarætlanin er skipað, hvussu førleikin er til tær ymsu uppgávurnar, o.s.fr. Um ætlanin er meira útgreinað, enn pláss er fyri her, kann ein gjøllari lýsing leggjast við sum talmerkt fylgiskjal.

## Arbeiðsgongd:

Lýsing av hvussu verkætlanin verður framd í verki:

Greiðið frá, hvussu arbeiðsgongdin við verkætlanini er løgd til rættis. Vís t.d. á, hvør ið tekur sær av teimum ymsu, ætlaðu uppgávunum, hvussu tíðarætlanin er skipað, hvussu førleikin er til tær ymsu uppgávurnar, o.s.fr. Um ætlanin er meira útgreinað, enn pláss er fyri her, kann ein gjøllari lýsing leggjast við sum talmerkt fylgiskjal.

# Umsókn

| Verkætlanin byrjar: | Verkætlanin endar: |
|---|---|
| Stuðul kann bert latast til arbeiði, sum er framt í stuðulsárinum. Gongur verkætlanin yvir fleiri ár, má søkjast av nýggjum á hvørjum ári. At stuðul er latin eitt árið, er ikki trygd fyri, at stuðul verður latin aftur komandi árið. | |

Fíggjarætlan (samandráttur):

| |
|---|
| Útreiðslur til lønir: |
| Útreiðslur til keyp av plantutilfari: |
| Útreiðslur til aðrar vørur: |
| Útreiðslur til tænastur: |
| Aðrar útreiðslur: |
| Útreiðslur samanlagt: |
| |
| Eginfígging: |
| Stuðulsfígging frá Búnaðarstovuni: |
| Onnur fígging: |
| Inntøkur samanlagt: |
| Um fíggjarætlanin er meira útgreinað, enn umsóknarblaðið sýnir, kann fíggjarætlanin leggjast við sum talmerkt fylgiskjal. |
| |
| Um verkætlanin gongur yvir fleiri ár, skal verða upplýst um, hvussu leingi, og hvussu stóran stuðul, ætlanin er at søkja um næstu árini av játtanini til grønmetisstuðul:<br><br>Stuðul kann bert latast til arbeiði, sum er framt í stuðulsárinum. Gongur verkætlanin yvir fleiri ár, má søkjast av nýggjum á hvørjum ári. At stuðul er latin eitt árið, er ikki trygd fyri, at stuðul verður latin aftur komandi árið. Um ætlanin er at halda fram í fleiri ár, skrivið so árstølini og ætlaðu upphæddirnar. |

Kunning:

| |
|---|
| Hvussu og nær verður frágreiðing um úrslitið av verkætlanini latin Búnaðarstovuni:<br><br>Búnaðarstovan leggur dent á, at úrslit av verkætlanum, sum verða stuðlaðar, kunnu leggjast á heimasíðuna og vera tøk hjá almenninginum, so skjótt sum gjørligt. Frágreiðing (helst talgild) um úrslitið av verkætlanini skal latast Búnaðarstovuni, so skjótt verkætlanin er liðug, ella innan 1. februar eftir lokið fíggjarár. At lata frágreiðing inn seinni krevur avtalu við Búnaðarstovuna. |

Aðrar viðkomandi upplýsingar:

| |
|---|
| Eru aðrar upplýsingar um verkætlanina, sum kunnu hava týdning fyri viðgerðina av umsóknini:<br><br>Eru aðrar upplýsingar um verkætlanina, ið verða mettar viðkomandi fyri viðgerðina av umsóknini á Búnaðarstovuni, kunnu tær skrivast í henda teigin. Eru fleiri upplýsingar enn enn pláss er fyri her, kann ein gjøllari lýsing leggjast við sum talmerkt fylgiskjal. |

# Umsókn

Fylgiskjøl:

| |
|---|
| Hvussu nógv fylgiskjøl eru knýtt at umsóknarblaðnum:<br><br>Skrivið samlaða talið av fylgiskjølum. |

| | | |
|---|---|---|
| | Váttan: | |
| Staður: | Dagfesting: | Undirskrift: |

Umsóknarblaðið skal váttast við staði, dagfesting og navni. Við síni undirskrift játtar umsøkjarin eisini undir revsiábyrgd, at upplýsingarnar eru rættar og álítandi.